gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Marcello verður við ímóti B71

**Sandoyingar iðra seg illa um tapið á heimavølli ímóti FS Vágum**

Toftamenn hava framvegis til góða at vinna í landskappingini í ár. Hetta var ikki akkurát tað, sum teir høvdu vónað og kanska roknað við. Sunnudagin fáa teir ein nýggjan møguleika, og ætla teir sær at vera við í toppinum, so er talan um heimadyst, sum skal vinnast.

Fyrstu umførini saknaði B68 álopsparið frá í fjør. Ímóti NSÍ var Súni Fríði Johannesen við, og hann skoraði. Marcello Marcellino er við í hópinum ímóti B71, men tað er ikki víst, at hann verður við frá fyrsta bríksli. Mortan Hansen hevur verið sera vandamikil, síðani hann kom á Svagaskarð.

Oleif Joensen, sum var leikbannaður ímóti NSÍ, er tøkur aftur.

### Klossaðu

Á Sandi iðra teir seg bláar og gular! um, at teir ikki fingu trý stig ímóti FS Vágum. Í B71 halda teir, at tað meiri var teirra skilaleysa taktiska spæl, sum var orsøkin til tapið, enn tað vóru dygdirnar hjá mótstøðumonnunum.

Allir spælararnir eru tøkir og hava tískil møguleika so at siga at gera tað gott aftur. Eli Hentze gjørdist pápi at einum soni hósdagin (tillukku við tí, tit bæði), so kanska fer hann at vera serliga væl upplagdur á Svangaskarði!

Dysturin á Toftum er annars sermerktur av tí, at tað eru tveir gamlir liðfelagar, sum hava ábyrgdina fyri liðunum. Jóannes Jakbobsen og Kári Reynheim spældu saman í HB, og teir royndu seg eisini saman í næstbestu norsku deildini í 1986. Harafturat vóru teir liðfelagar í nógvum av teimum fyrstu altjóða skrásettu landsdystunum. Nú standa teir á odda fyri hvørt sítt árstalsfelag.

**jh**

## Dystirnir um vikuskiftið

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 20.05 | GÍ-B36 | Oddmar Andreasen |
| 20.05 | KÍ-NSÍ | Eiler Rasmussen |
| 20.05 | HB-VB | Petur Hansen |
| 20.05 | B68-B71 | Suni Johansen |
| 20.05 | FSV-EB/S | Lassin Isaksen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 19.05 | Skála-B36 | Tummas Pauli Olsen |
| 19.05 | NSÍ-Sumba | Jógvan A. Jacobsen |
| 19.05 | HB-LÍF | Dagfinn Olsen |
| 19.05 | ÍF.KÍ | Páll Augustinussen |
| 19.05 | GÍ-TB | Edvard Højgaard |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 20.05 | GÍ-B36 | Rúni Gaardbo |
| 20.05 | KÍ-Royn | Ólavur Weihe |
| 20.05 | AB-VB | Dia Lamhauge |
| 20.05 | B68-B71 | Jonhard Hansen |
| 20.05 | IF-TB | Palli Gregersen |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 20.05 | HB-B36 | Lars Müller |
| 20.05 | VB-KÍ | Petur E. Kjærbo |

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 3 | 3 - 0 - 0 | 9 | 3 | 6 | 9 |
| 2 | B36 | 3 | 2 - 1 - 0 | 6 | 1 | 5 | 7 |
| 3 | VB | 3 | 2 - 0 - 1 | 11 | 3 | 8 | 6 |
| 4 | HB | 3 | 2 - 0 - 1 | 7 | 4 | 3 | 6 |
| 5 | NSÍ | 3 | 1 - 2 - 0 | 3 | 2 | 1 | 5 |
| 6 | KÍ | 3 | 1 - 0 - 2 | 3 | 5 | -2 | 3 |
| 7 | B71 | 3 | 1 - 0 - 2 | 2 | 5 | -3 | 3 |
| 8 | FS Vágar | 3 | 1 - 0 - 2 | 2 | 8 | -6 | 3 |
| 9 | B68 | 3 | 0 - 1 - 2 | 3 | 8 | -5 | 1 |
| 10 | EB/ Streymur | 3 | 0 - 0 - 3 | 0 | 7 | -7 | 0 |

## Støðan, danska superligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK | 29 | 14-11-4 | 47 | 25 | 22 | 53 |
| 2 | Silkeborg | 29 | 14-11-4 | 43 | 29 | 14 | 53 |
| 3 | Brøndby | 29 | 15- 7 -7 | 66 | 36 | 30 | 52 |
| 4 | FCM | 29 | 13- 9 -7 | 45 | 39 | 6 | 48 |
| 5 | Viborg | 29 | 12- 7 -10 | 46 | 33 | 13 | 43 |
| 6 | OB | 29 | 12- 6 -11 | 45 | 38 | 7 | 42 |
| 7 | AaB | 29 | 10-10-9 | 45 | 43 | 2 | 40 |
| 8 | Lyngby | 29 | 11- 7 -11 | 36 | 46 | -10 | 40 |
| 9 | AGF | 29 | 11- 4 -14 | 44 | 53 | -9 | 37 |
| 10 | AB | 29 | 5 -14-10 | 35 | 39 | -4 | 29 |
| 11 | Herfølge | 29 | 5 - 9 -15 | 36 | 58 | -22 | 24 |
| 12 | HFK Sønderj. | 29 | 1 - 7 -21 | 26 | 75 | -49 | 10 |

# Skoti er komin til NSÍ

**Christian Høgni verður við ímóti KÍ, men ikki nýggi skotski álopsspælarin. Í Klaksvík hava fýra spælarar verið burturi frá venjing í hesi vikuni**

Higartil í ár hevur NSÍ verið eitt av heilt fáu feløgunum, sum ikki hevur havt útlendingar á liðnum. Men nú eru ætlanir um, at ein skoti skal hjálpa teimum í Runavík at skjóta mál.

Í fyrradagin kom 24 ára gamli Martin Glancy til Runavíkar. Hann hevur spælt í Chystel FC í næstbestu skotsku deildini. Hetta er felag tætt við Inverness.

Næstbesta skotska deildin fer nú í summarfrí. Jens Martin Knudsen kennir skotan, sum kanska verður liðfelagið hjá Jens Martini og teimum. Sambært Ísak Mikladal, FSF aðalskrivara, var spæliloyvið ikki komið upp á pláss í gjáramorgunin.

– Vit hava ongan sáttmála gjørt, og tað er greitt, at nýggi maðurin fer ikki at spæla við í Klaksvík sunnudagin. Hann skal fyrst vísa undir venjing og kanska í 2. deild, hvør dugur er í honum.

Hetta sigur Hans Petur Ellingsgaard úr leiðslubólkinum hjá NSÍ. Fleiri feløg hava brent seg av royndum við útlendingum, og tað ætlar NSÍ at byrgja uppfyri skal koma fyri hjá teimum.

Christian Høgni Jacobsen noyddist mikukvøldið í Miðvági út, tá tíggju minuttir vóru spældir. Ein vøddaskaði í lærinum spøkti, men teir rokna við, at landsliðsmaðurin verður við ímóti KÍ.

Sjúrður Jacobsen og Ian Højgaard, sum vóru leikbannaðir í Miðvági, eru tøkir aftur.

### Fýra burturi

Í Klaksvík rokna teir ikki við, at Ove Nysted verður við. Knæskaðin, sum hann fekk í steypadystinum ímóti NSÍ sunnudagin, ger, at hann skal binda frið í eina viku afturat. Fríðin Ziskason hevur ikki vant í vikuni, og tað er ivasamt, um hann verður við.

Brøðurnir Jan og Allan Joensen skuldu fyrstu ferð venja í gjárkvøldið. Teir eru svornir Liverpool viðhaldsmann. Teir hava saman við trimum øðrum klaksvíkingum verið í Týskalandi og hugt at UEFA Cup finaluni, og eftir Liverpool sigurin er lagið sjálvandi gott. Joensen brøðurnir eru báðir lyklaspælarar hjá KÍ, og teir verða báðir á liðnum imóti NSÍ.

Fyrra semifinalan ímillum hesi bæði liðini í Klaksvík síðsta sunnudag endaði 1–1.

**jh**

# Todi og Jákup vóru bestir á sínum liðum

**Superligan: Men meðan Todi Jónsson og FCK hava kós ímóti meistaraskapinum, so kom Herfølge hóskvøldið uppaftur nærri niðurflytingini**

Lagið í FCK er ógvuliga gott. Hóskvøldið var 29. umfarið í superliguni á skránni, og FCK styrkti um sína støðu í kappingini um DM. Frammanfyri 19.415 áskoðarum í Parkini vunnu teir 3–0 á FCM. Brøndby megnaði bara 1–1 á útivølli ímóti AB. Silkeborg vann – ikki sannførandi – 1–0 á niðurflutta Sønderjylland.

Nú stendur DM kappingin bara ímillum hesi trý feløgini. FCK er á odda, og harvið hava teir sjálvir møguleikan at gera av, hvar skápið skal standa.

Todi Jónsson skoraði ikki, men sambært donskum fjølmiðlum var hann framúr væl upplagdur. Ekstra Bladet skýrir Toda og álopsfelagan Sibusiso Zuma sum "den dødelige duo", og heldur fram, at teir "viste sig i et overdådigt spillehumør".

Tá tað restaði eitt korter, valdi venjarin at spara Toda, men kortini fekk hann hægsta karakterin í Parkini. Zuma skoraði til 1–0 eftir returbólt frá málverjanum. Tá vóru tólv minuttir farnir, og tveir minuttir seinni økti verjuspælarin Jakob Laursen upp á brotsspark. Tað varð dømt, tá Todi Jónsson varð feldur.

Heine Fernandez avloysti Toda, og fýra minuttir undan leikloki staðfesti hann sigurin við stútara eftir innlegg.

FCK og Silkeborg hava 53 stig, men FCK er frammanfyri, tí teir hava betri málmun. Brøndby hevur 52 stig. Øll hini feløgini eru so mikið aftanfyri, at tað verður ikki roknað við teimum, nú tað eru fýra umfør eftir at spæla.

### Herfølge hjálparleyst

Lagið í Herfølge er ikki gott. Hóast Jákup Mikkelsen hevði fleiri stórar bjargingar, so nyttaði tað einki í Odense. Í oysandi regni vann heimaliðið 4–2. Málskjúttarnir vóru púra einsamallir við Jákupi, tá teir skoraðu.

OB var frammanfyri 3–2 í steðginum. Teir komu framum 2–0, men tveir minuttir eftir seinna málið minkaði Chris Hermansen um munin. Eftir 42 minuttir økti OB, men í síðsta minuttinum undan steðginum minkaði innskifti Dennis Conthe, sum onkuntið var upp á spæl í 2. hálvleiki. Miðskeiðis í seinna umfarinum økti innskifti Jonas Schmidt, og so var liðugt hjá Herfølge. Johan B. Hansen var ikki á liðnum hjá OB.

– Vit mugu taka okkum saman, ella flyta vit niður, staðfesti venjarin.

Støðan hjá Herfølge myrknaði. AGF vann 1–0 í Lyngby, og harvið er greitt, at AGF ikki kann flyta niður. AB javnleikurin ímóti Brøndby hevði við sær, at munurin frá Herfølge og upp til AB øktist til fimm stig, og AB hevur væl betri málmun enn Herfølge.

Sunnudagin verður spælt soleiðis: Herfølge–AaB, AGF–FCK, FCM–OB, Viborg–Sønderjylland og Silkeborg–AB. Mánadagin fær Brøndby vitjan av Lyngby.

gult15 cyan15 magenta15 svart15

**Vikuskifti**

Nr. 95 • leygardagur • 19. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Tónleikur fingið føroyskt heimstað á netinum

Lesið á síðu 12





## Tey syngja vestan fyri fjall

»Kórið Sólarmagn hevur sína fyrstu konsert«

**Lesið á síðu 3**



## Teldupostur órógvar arbeiðsfriðin

Strongd og dýrabar arbeiðstíð, ið fer til spillis. Hetta er avleiðingin av mongu óneyðugu teldupostunum, ið fleiri ferðir um dagin leypa fram á telduskíggjan. Í Danmark eru virki farin at áseta teldupostfríar tímar

**Lesið á síðu 2**



## Summarfrí í skotskum húsvogni

Innarlaga á syðra armi á Moray Firth í Skotlandi standa tveir húsvognar, hjá Atlantic Airways, sum ætlaðir eru at leiga føroyingum til at halda summarfrí í

**Lesið á síðu 6-7**

Kórið - MPIRI:

# Útisetar í kórhýri

**Teimum, tú nýtir gott av, skalt tú rósa. Ungum fólki við so nógvum í sær skalt tú geva eitt heraklapp, skrivar Frits Johannesen m. a. í ummæli av konsert hjá Mpiri í rundatorni í Keypmannahavn 28. apríl**



UMMÆLI
*Frits Johannesen*

28. apríl hevði Mpiri konsert í Rundatorni. Útisetar í kórhýri settu dám á løtuna ovast uppi í hesum sjaldsama bygningi. Skráin var sett saman soleiðis, at hon hevði ein spegilsás, ið deildi skránna so speglingarnar vóru smidligar vallingar á spegils-blankum vatni. Kórsangararnir vóru í búna, sum Anna Mortensen og Dania Danielsen høvdu skapað. Meginparturin av evninum í plagginum var føroysk ull. Her var skap í orðum, tónleiki og yndisligum plaggi. Soleiðis skal tað vera.

Sunnleif Rasmussen leiddi kórið. Sunnleif roynist væl sum kórleiðari. Hann aldi fram væl av høviskum ljóði úr teimum ungu røddunum í hesum runda umhvørvi ovast uppi. Sagt er um Pætur tann Stóra (1672-1725), tá ið hann var og vitjaði í Danmark, fór hann við hestavogni upp í Rundatorn. Vit, sum lurtaðu, komu tenjandi niðan brekkuna og funnu okkum ein góðan sess og lótu Pjotr 1. vera tað, hann var (hann var ikki av Guðs bestu børnum) og lurtaðu til hetta væla kór, sum tú tókst til tín og var eitt sindur errin av, tí hetta vóru føroysk ungfólk, útisetar, ið lættu ljóðið av. Sera dugnalig ung fólk, sum nomu við listaliga træðrir í sanginum. Í livandi tónleiki fellur altíð okkurt av. Onkuntíð kundi tú hugsað tær, at røddirnar vóru eitt sindur skúlaðar, men hetta var bara ein fjøður í hattin, at onkur hoyrdist burtur úr á síni kórferð hetta kvøldið.

Eg má taka til Trónd Bogason við sínum snildisliga máta at lata kallmannaljóðið í sínum skapandi tónleiki fara um musisku teigarnar í turkiløgum, sum stóðu steyrrøtt, á skák, tyngd av nýslignum grasi, men eisini við angandi hoyggi, sum stóð í næsarnar, tá ið tónleikur hansara í kyldum nam við tey turru stráini. Ein ungur tónlistamaður við hugflogi, sum fer at menna føroyskan kórsang og tónleik. Ja, hann hevur longu gjørt vart við seg.

Spegilsmyndin í skránni var snildisliga sett saman av forvitnisligum skaldakynstri og musikalskum ljóði. Ungmannakæti í skapandi líki speglaði sær í ekspressivum líki í tónleikinum, men eisini álvarsemi stóð á breddanum hetta kvøld t. d. Vem är du – Vagn Holmboe/Pär Lagerkvist og Nun lob mein Seel – Kári Bæk, trad. danskur og týskur tekstur.

Speglingin í hesum løgum lá væl síð um síð, hvíldu har sum Kvívík liggur. Kári er hóvsamur í síni gongd sum tónaskald. Í tónleikalitkornum hansara eru ljómur av nútíðardámi at hóma, men klassisman eigur løturnar í tónleikamálinum og ger, at ikki er so fremmant fyri vanliga oyrað at syngja løgini hjá honum. Tað rennur ein dámur av reinleika, føroyskum og norðurlendskum ljóði bæði aldrandi og internýljómi úr hond hansara, og tað er sára gott.

Tað var nógv at tríva í. Teimum, tú nýtir gott av, skalt tú rósa. Ung fólk við so nógvum í sær skalt tú geva eitt heraklapp. Aspest hjá Boga Nielsen v. fl. við lagi og kórsatsi hjá Tróndi, fekk greinskrivaran at undrast, síggja hvussu samljóðið í tónleikalistini fara sprelskt avstað í rørslum, ljóðið hjá fólkum, sum eiga so nógv í sær, at tað má út. Eitt sera skemtiligt stykki, har ein ostinatur róði í føroyskum – samiskum – og skrælingaljóði, har sangararnir trinu dansin, gloppaðu gluggan við rapsangi av Trónda Bogasyni og Jensinu Olsen í ikoniskum lagi. Eitt sera hugtakandi postludium og fyrimyndarliga borið fram… ja, latið í aspest.

Tað regnaði hetta kvøld. Tú hoyrdi røddina hjá Dánial Hoydal, sum í satsinum hjá Kára sang: Lover nu Herren… Lover nu Herren,… meðan fólk sum skuggar fóru sínar lógligu leiðir… og alt var so sera gott – eisini røddin hjá hesum unga havnardreinginum, sum var millum droparnar, myrkrinum, gatuljósinum og í tíni egnu sál.

Hetta var føroyskt.



